## Dýrari á Strondum

Aftan á nýggjár verður tað dýrari hjá foreldrum í Sjóvar kommunu at hava børn á dagstovni í kommununi. Bygdaráðið hevur samtykt hækka gjøldini, soleiðis at gjaldið fyri eitt vøggustovupláss hækkar úr 1.950 krónum í 2.200 krónur, barnagarðspláss hækkar úr 1.700 krónum í 1.775 krónur, og pláss í frítíðarstovu hækkar úr 1.000 krónum í 1.100 krónur um mánaðin. Í løtuni eru 103 børn á stovninum, men í mars næsta ár verða tey 111.



## Sjey vánaligir árgangir

Sjeynda árið á rað vísa rannsóknir hjá fiskifrøðingum, at lítið av toski kemur undan við Ísland. Tíðindini koma óvart á fleiri. Fyrr í ár mótmæltu fiskimenninir avgerðini hjá stjórnini at skerja toskakvotuna, tí fiskimenninir vildu vera við, at nógvur toskur var á gýtingarleiðunum í vár, og at tí mundi ein góður árgangur vera á veg. Men hetta vísir seg nú ikki at halda. Havrannsóknarstovan sigur stutt, at 2007-árgangurin er líka ringur sum allir síðani 2001.

# Ófriður og herverk í Havn

**- Tað, sum hendir í býnum eitt slíkt vikuskifti, hendir er oftast tí, at fólk eru ov drukkin og duga sær ikki hógv, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn**

VIKUSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú tað stundar til jólar, og nógvar fyritøkur skipa fyri jólafrokostum, merkir hetta eisini, at nógv fólk er í býnum. Nógv verður drukkið, og tað hendir meira enn so, at okkurt keðiligt spyrst burtur úr, tá ið fólk gerast ov full.

Vakthavandi sigur, at talið av fullum fólki í býnum í vikuskiftinum hevur verið meira enn eitt miðal vikuskifti.

- Vit hava verið nógv úti, tí fólk hava boðsent okkum, men í fleiri førum er talan ikki um tey stóru málini.

### Ófriður á gøtuni

Løgreglan sigur, at tey vórðu boðsend einar 15 ferðir í vikuskiftinum til ymiskan ófrið, bæði úti á gøtuni og í onkrum føri heima við hús hjá fólki, og okkurt harðskapsmál hevur eisini verið.

- Í flestu førum eru tað full fólk, sum eru komin til ilnar, og í nógvum førum ber til at tosa partarnar til sættis.

Løgreglan sigur, at tey royna altíð at brúka tann mildasta háttin fyrst, sum hann tekur til, og tað er at vita, um partarnir, sum eru komnir til ilnar, kunnu skiljast í sátt og semju. Tað er sum oftast tað besta fyri báðar partar.

- Men sjálvandi; hetta gongur ikki altíð, og tá noyðist løgreglan at taka stig til at loysa málið. Í øðrum førum kann talan vera um veruligan harðskap, soleiðis at annar parturin meldar hin, og tá gerst hetta til eitt mál.

### Herverk á bilar

Okkurt herverksmál hevur eisini verið í vikuskiftinum, og í tí eina førinum hevur ein ungur maður gjørt seg inn á tveir bilar í Varðagøtu.

- Í hesum førinum var tað ein maður, sum var á veg oman í býin. Á vegnum gjørdi hann seg inn á tveir bilar í gøtuni. Vit halda ikki, at nakað bevíst lá aftanfyri hetta, men at maðurin, sum var um 20 ára aldur, kanska "keddi" seg á ferðini omaneftir.

Løgreglan sigur, at í einum øðrum føri hevði ein maður, sum var útihýstur á eini ølstovu, brotið onkran rút í hevnd.

- Tað, sum hendir í býnum eitt slíkt vikuskifti, hendir er oftast tí, at fólk eru ov drukkin og duga sær ikki hógv, sigur vakthavandi.




*Løgreglan í Havn hevur verið nógv úti í vikuskiftinum, tí fólk ikki duga sær hógv í fyllskapi*

# Skumpaði tvey á sjógv

**- Hetta vóru ivaleyst fullamannalótir, men slíkt er ikki at spæla við og kundi í ringasta føri endaðu á syndarligan hátt, sigur vakthavandi**

VIKUSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Tvey fólk endaðu á blámanum niðanfyri Glitnir á Skálatrøð í vikuskiftinum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Í vikuskiftinum fór ein hending fram niðanfyri Glitnir á Skálatrøð, sum kundi endað við eini vanlukku, um illa vildi til.

- Tá ið fólk hugna sær og drekka, hendir meira enn so, at tey ganga niðri við bátarnar. Slíkt er ikki heppið. Soleiðis var eisini nú í vikuskiftinum, tá ið fólk gingu niðri við bátabrúgvarnar á Skálatrøð.

Vakthavandi sigur, at í tí eina førinum var onkur komin at skumpa tvey onnur á sjógv beint niðanfyri Glitnir á Skálatrøð.

- Vit halda ikki, at nakað bevíst lá í hesum, men meira tað, at fólk vóru komin at keglast, og so skumpaði annar parturin hini bæði spontant í havið.

Vakthavandi sigur, at tað var ein kvinna og ein maður, sum soleiðis endaðu á blámanum hetta kvøldið.

- Hetta vóru ivaleyst fullamannalótir, men slíkt er ikki at spæla við og kundi í ringasta føri endaði á syndarligan hátt.

Sum skilst á vakthavandi, fingust tey bæði, sum endaðu á sjónum, uppaftur í øllum góðum.

# Noyddist at biðja um hjálp

VIKUSIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein hýruvognsførari í Havn noyddist í vikuskiftinum at biðja løgregluna um hjálp, tá ið eitt vikiskiftafólk gav honum trupulleikar í bilinum.

- Tað gjørdist handfast í bilinum. Tvey fólk – ein maður og ein kvinna - vóru á veg til hús í hýruvogni, tá ið tað gjørdist handfast. Vit hava skilt, at maðurin hevði hug at vera harðligur við kvinnuna, og hetta gekk eisini útyvir hýruvognsføraran, sum noyddist at boðsenda løgregluni.

Vakthavandi sigur, at hýruvognsføraran ikki beinleiðis var sligin, men tað vóru serliga klæðini hjá honum, sum hetta var gingið útyvir.

- Vit vita ikki í løtuni, um hetta gerst til eitt harðskapsmál, sum verður meldað, tí maðurin var harðligur bæði yvirfyri kvinnuni og hýruvognsføraranum, sigur vakthavandi á politistøðini.